Fingust við ymist, ið hevur við fisk at gera í tríggjar dagar

Í Felagsskúlanum á Oyrarbakka hava næmingar og lærarar lagt niður ta vanligu tímatalvuna og hava í tríggjar dagar fingist við ymist, ið hevur við fisk at gera.

Mánadagin lærdu næmingarnir seg at knýta knútar. Eisini varð vitjað á virkinum á Oyrarbakka, Netamontering, ið ger gørn. Henda dagin høvdu vit eisini vitjan av fiskifrøðingi frá Fiskirannsóknarstovuni, ið greiddi okkum frá um tey ymisku fiskasløgini undir Føroyum.

Seinni um dagin varð vitjað á Uppboðssøluni á Toftum, har vit eisini keyptu fisk, ið skuldi verða nýttur til matgerðina dagin eftir.

Týsdagin vórðu næmingarnir býttir í bólkar og fingu møguleika at royna seg á ymsum økjum.

Tey fingu møguleika at royna seg at skera kjálkar, flekja, skrædla, gera frikadellur og knetti, steikja flak og kjálkar og at gera ymisk sløg av sildasalati.

Eisini vórðu filmar vístir. Næmingarnir gjørdu eisini borðprýði, ið sjálvsagt vóru fiskar í alskyns litum.

Mikudagin vórðu skúlastovurnar pyntaðar, og á middegi settust øll til borðs at njóta tann góða matin, ið smakkaði sera væl.

Tríggir góðir, læruríkir dagar vóru at enda komnir.

Á ferð gjøgnum søguna ár 0-2000

Hósdagin 7. desember lat upp framsýningin »Á ferð gjøgnum søguna ár 0-2000«.

Næmingar í fólkaskúlanum hava arbeitt við eini evnisviku undir heitinum »Føroyar kristnar í 1000 ár«, og er tað hetta arbeiðið, sum verður víst fram, og kunnu fólk sostatt síggja, hvat ið børnini hava fingið burtur úr.

Á framsýningini kunnu síggjast tekningar, klæði o.s.fr., sum børnini hava gjørt.

Landsmiðstøðin hevur staðið fyri evnisvikuni og hevur lagt til rættis framsýningina.

Ætlanin er, at framsýningin verður í Norðurlandahúsinum til og við 9. januar 2001, sigur Norðurlandahúsið í tíðindaskrivi.

VIÐMERKINGAR

Norrøna

Palli Dalsgaard

Tað sær ikki væl út við okkara stoltleika á havinum, »Norrønu« Hvat verður av skipinum? gleppur tað okkum av hondum? um tað ólukkuliga skuldi hent, hvat so? Eg havi ikki skil fyri skipum og skiparakstri, men ein og hvør dugir at síggja, at skipið hevur ein ómetaligan týdning fyri okkum í so mangar mátar. Alt tað fólkið sum har siglir við um summarið og øll uppi á landi sum hava tilknýti til skipið, bæði á ein og annan hátt. Allur tann ungdómur, ið har kann tjena sær nakrar krónur í summarfrítíðini, og ikki at forgloyma øll turisman sum nú er komin væl í gongd, og hevur givið eitt gott úrslit. Tað eru fólk, sum hava hug at seta seg afturá í stólinum og siga, ella ugga seg sjálvi, at tann tíðin er farin, tá landið hjálpti til. Tað er púra rætt, men vit mugu ikki gloyma, at tann tíðin ikki var einans av tí onda, nakað annað er, at tá var farið út um alt mark við játtanum.

Sjálvandi skulu vit læra av mistøkum ið gjørd eru, men tann stóri spurningurin sum nú leikar á er, hava vit ráð at lata vera. Gleppur Norrøna okkum av hondum, hava vit nakað at seta í staðin? Hvaðar skal alt tað fólkið fara, ið har hevur haft sína úrtøku av skipinum. Salgið av Teistanum var eitt stórt mistak, eru vit í ferð við næsta mistakið? Hesin spurningur gevur okkara ráðandi fólkið nógv at hugsa um: Hvat vinna vit? Hvat tapa vit? Eitt er púra greitt, vit tapa nógv um vit lata alt fara.

Norðmenn, íslendarir og amerikumenn eru í ferð við at fara við stórum parti av okkara vinnulívið. Tað vísir seg ikki at nakar gevur sær stórvegis far um, at so er. Norrøna skuldi ikki farið sama veg, hon hevur tvær ferðir fingið fíggjarliga hjálp úr landskassanum, men hevur goldið tað hjálpina aftur.

Latið Norrønu fáa 100 milliónir av teim uppspardu fullveldis milliónunum, tær fara ikki betur.

Vit skulu sjálvir

Steinbjørn B. Jacobsen

Tað eru komnar nógvar góðar, vakrar og nyttugar bøkur í hesum árinum, men eg má vísa á eina lítla bók burtur úr rúgvuni, sum er 100 síður stór og kostar 140 kr. við ongari mynd á permuni.

Flest munnu halda, at tey hava lisið alt, sum Jørgen Frantz Jacobsen hevur skrivað ella vistu um tað.

Nú kom upprunahandritið til Barbaru, og samstundis kemur henda fitta bókin: Vit skulu sjálvir, nítjan greinar ella lesarabrøv har meir enn helmingurin er skrivaður á føroyskum, tær flestu hava staðið í Tingakrossið

Tað er Turið Sigurðardóttir, sum hevur savnað bókina og skrivað ein góðan inngang, og Fannir gevur bókina út.

Tað kennist so løgið at lesa hesar 70-75 ára gomlu greinar eftir Jørgen Frantz. Ikki bara tí, at tú sær hesa síðuna av Jørgen Frantz, og at tær eru so væl skrivaðar, sanniliga eisini tær á føroyskum, men greinarnar kudnu tíverri verið skrivaðar í dag. Hann skrivar ikki bara um sambandi millum Danmark og Føroyar og danskt mál í Føroyum og harvið eisini um tað føroyska málið, men um vegir og vinnulív. Tað er sum at hoyra nútíðar búskaparfrøðingar, tá ið hann skrivar um: »Okkara fíggjarviðurskifti« og »Statshjálp til vinnulívið« har hann t.d. sigur: »Men alt tað, sum staturin fekk upp í lag datt niðurfyri. Tað kostaði stóran pengar og kastaði líðil av sær«. Í røðuni »Vit skulu sjálvir«, sum varð hildin í Mannafellsdali í 1927 vísir hann á, at stórur framburður er í Føroyum aftaná 1889, tí tá trúðu vit uppá, at vit kundu vera sjálvbjargnir, »men so hendi vanlukkan, at føroyingar fóru at ivast, um teir kundu vera sjálvbjargnir«. (1906). Røðan endar tó við teimum eggjandi orðunum:»Vit skulu sjálvir«.

Hetta er ein logiskur endi av røðuni, tí sum hann sigur: »Henda hugsanin, at vit ikki skulu vera sjálvbjargnir, kann spilla eitt fólk.«

Hann loypir ikki lætt um pengarnar, sum koma úr Danmørk, umleið ein millión krónur, men hann vísir eisini á, at vit høvdu kunna goldið hetta sjálvir, um vinnulívið var sunt, og vísir til tað íslenska vinnulívið.

Kjarnuna í øllum málunum er trúgvin á egnan førleika og viljin til sjálvbjargni mótvegis bara at dúva uppá statshjálp.

Chr. Matras segði, at teir vantaðu so víst, at Jørgen Frantz bleiv politikari.

Óivað tað, hann hevði gávurnar til at blíva so nógv. Vit mistu nógv við deyða hansara, men hann gav okkum sanniliga nógv, áðrenn hann andaðist.

Tað er so løgið við tekstinum í hesi lítlu bókini, sum hevur ligið burturgoymdur fyri almenninginum til nú, men hon kemur í tøkum tíma. Jørgen Frantz luttekur beinleiðis í nútíðar kjakinum.

Hoyr bara, hvat hann sum ein annar profetur sigur í 1936, tað árið Javnaðarflokkurin av álvara vann fram;»Alt valdast, hvussu føroyskir javnaðarmenn fara at roynast. Við teirra stóra atkvøðutali og teirra politiska tilknýti til stjórnina hava teir eina valdstøðu sum eingin annar føroyskur flokkur. Teir kunnu lata seg freista at gera somu mistøkini sum Sambandsflokkurin.«

Bæði so og so rúmar hendan lítla bók eina mongd, sum tú vildi tikið fram, men hon skal lesast og njótast í heilum líki.

Loysingarlandsstýrið og »Brimil«

Andras Miðskarð

Alt bendir á, at sitandi landsstýri má brúka mánaðir, fyri at fáa loyst eitt so átrokandi mál, sum tað at fáa Vaktar- og bjargingartænastuna at virka. Tí vil undirritaði so staðiliga taka undir við okkara andstøðuflokkum, tá teir siga, at nýval átti at verið útskrivað.

Landaskomm

Nú er ein góður mánaði farin, síðani landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fekk handað hetta stásiliga far »Brimil«. Men enn liggur skipið í Noreg vegna reinan kleyvarskap av landsstýrinum.

Bæði Karsten Hansen og fíggjarmálastýrið hava vitað leingi, at áðrenn yvirmenn, bæði á brúnni og í maskinrúminum yvirtóku skipið, skuldi nýggjur sáttmáli fyriliggja. Men hvørki Karsten Hansen ella fíggjarmálastýrið hava vilja vitað av einum sáttmála, sum svarar til skipastøddina.

Seinast vit fróttu, skuldi trætan loysast við semingsmonnum, ella skuldi farast í tingið at fáa steðgað hesi ósemju, sum teir sjálvir hava skapt. Teir vilja við øðrum orðum ikki kennast við sítt egna barn.

Hækkaðu sína egnu løn

Tá trætan tók seg upp um lønarkrøvini hjá hesum omanfyri nevndu yvirmonnum, segði fíggjarmálaráðharrin, at eingin hevði hoyrt um slíka lønarhækking áður, men eg fari at loyva mær at rætta uppá landsstýrismannin. Tí hvør var tað, sum játtaði sær sjálvum 60% í lønarhækking? Jú tað gjørdu politikararnir.

Hvør ansar nú fiskiveiðutjóvunum?

Líka síðani vaktarskipið »Gorm« var tikið úr tænastuni, hevur bert Tjaldrið røkt hesa tænastu saman við donsku sjóverjuni. Hvussu effektivt hetta vaktarhald hevur verið (við »Brimli« liggjandi við bryggju í Noreg), kann bert hin einstaki meta um.



Toska- og hýsuprísirnir eru teir bestu, sum menn vita um. Tí er freistandi fyri allar fiskimenn (bæði okkara egnu og útlendingar) at royna á stongdum leiðum. Fiskimenn eru jú ikki óvitandi um óskilið á okkara havleiðum.

Spurningurin er tí: Hvussu stórt virði hava vit mist av berum kleyvarskapi frá okkara loysingarlandsstýri?

ítróttur

Nr. 244 • t‡sdagur • 19.desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Simona fer til Klaksvíkar

Simona Dziugyte sat leygardagin á heldur óvanda plássinum millum ásko›ararnar. Næstu fer› hon ver›ur í høllini á Giljanesi, ver›ur ta› helst í rey›a Stjørnubúnanum

Mynd: Edvard Joensen

Toppskjúttin í fremstu kvinnudeildini, Simona Dziugyte, fer í dag til Klaksvíkar, har hon ætlandi skal spæla vi › Stjørnuni

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk/Ivan Eginsson

Kanska besti leikarin, sum var í Ítróttahøllini á Giljanesi leygardagin, mátti taka til takkar vi› einum plássi millum ásko›ararnar.

Simona Dziugyte hevur í tíggju dystum skoti› 103 mál fyri Sóljuna, men leygardagin var hon so ikki á vøllinum.

Á veg til Stjørnuna

Orsøkin var› søgd at vera tann, at litaviski stórskjúttin hev›i bo›a› li›feløgum sínum frá, at hon ætla›i sær at spæla vi› Stjørnuni restina av kappingarárinum.

Tá vit sunnudagin royndu at fáa vi›merkingar til hesi tí›indi, var svari› alla sta›ni hitt sama, nevnliga at einki var at vi›merkja, men tá vit loksins fingu fatur á spælaranum sjálvum, vátta›i hon hesi tí›indi.

Sjálv sigur Simona, at hon fyri stuttum bo›a›i nevndini í felagnum frá, at hon ynskti at sleppa úr felagnum. Serliga tí at ítróttarligu vónir hennara ikki kundu røkkast vi› li›num.

Onkursvegna kom hetta klaksvíkingum fyri oyra, og tá hon fekk tilbo› um at koma nor›ur at spæla, tók hon av hesum.

Krevja pengar

Ta› sum sí›ani er hent í málinum, tykist vera, at Sóljan vil hava okkurt slag av sams‡ning fyri at lata spæliloyvi frá sær. Millum anna› skal talan vera um tær útrei›slur, sum felagi› hevur havt av at fáa spælaran til landi›, men Simona sigur annars, at ta› ikki er í strí› vi› felagi›, at hon gevst hjá Sóljuni.

Sambært hondbóltsreglunum er heldur eingin for›ing fyri, at Simona Dziugyte ver›ur á li›num hjá Stjørnuni, næstu fer› tær skulu í eldin.

Seinasti dystur hennara fyri Sóljuna var 10. desember, og tá fyrstkomandi dystur hjá Stjørnuni er 14. januar, er kravi› um 30 dagar leikste›g uppfylt.

Skuldi nor›ur í gjár

Hóast tey í Klaksvík ikki vilja gera stórvegis av vi›merkingum til máli›, so tykist ta› at kalla greitt, at litavin nú ver›ur at síggja á li›num hjá teimum.

Mánamorgunin seg›i Simona í øllum førum, at hon eftir ætlan flutti til Klaksvíkar sama dag, og í Klaksvík ver›a hesi tí›indi ikki avsanna›i.

Sum sagt, so fæst ikki stórvegis at vita um máli› úr Klaksvík, men tey ásanna tó, at Simona ætlandi skal vera á li›num, tá Stjørnan 14. januar skal til Vágs.

Sóljan-Neistin 14-24 (5-12)

Avgjørdu í fyrra hálvleiki

Birita Wardum fekk saman vi› li›feløgunum gó›ar fortreytir leygardagin, og tær vunnu eisini ein tryggan sigur á Sóljuni

Mynd: Edvard Joensen

Uttan litaviska stórskjúttan megna›i Sóljan ikki at gera stórvegis vi› Neistan, sum avgjørdi alt innan eitt líti› korter í fyrra hálvleiki

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Sum nevnt a›rasta›ni á hesum bla›sí›um, so noyddist Sóljan at vera mest ey›s‡nda leikaran hetta kappingarári› fyri uttan, tá tær leygardagin fingu vitjan av Neistanum.

Framman undan hesum var› rokna› vi›, at ta› fór at vera sera torført hjá Sóljuni at gera naka› vi› Neistan, og uttan Simonu Dziugyte var so at siga einki at gera.

Hevur ávirka› li›i›

Albert Ellefsen, sum tekur sær av vágagentunum, sigur vi› Sosialin, at har var ikki so nógv hjá teimum at gera.

– Alt hetta, sum er fari› fram í vikuni, órógva›i sjálvandi spælararnar, men ta› er greitt, at Neistin hevur eitt sterkari li› enn vit. Eisini um Simona er á li›num, seg›i hann, uttan tó at vilja gera a›rar vi›merkingar til máli› um júst Simonu.

Um dystin sjálvan seg›i Albert annars, at ta› leika›i nóg so javnt á fyrstu løtuna, men eftir at Neistin mi›skei›is í fyrra hálvleiki leyp avsta›, var alt so at siga avgjørt.

Vi› at hyggja at dómarase›linum sæst eisini, at Neistin hesa løtuna skeyt átta mál á ra›, og ta› sigur kanska eisini naka› um munin á li›unum.

Skulu verja borg

Nú Sóljan í nakrar mána›ir hevur roynt seg í bestu deildini, er kanska eisini náttúrligt at spyrja, hvørt tær hava vant seg vi› fer›ina í deildini.

Til hetta svarar Albert, at enn restar sjálvandi nógv í, men at tær so avgjørt eru vor›nar betri fyri.

– Ta› at gerast betri, má sjálvandi vera a›almáli›, umframt at vit so eisini mugu royna at halda Tjaldri undir okkum, tá ári› er runni›, heldur hann.

Tá vit at enda spurdu, hvørjar møguleikar hann rokna›i vi›, at Sóljan hevur fyri hesum seinasta, svara›i Albert, at ta› kann kanska ver›a ringt at gita um.

–Ta› veldst um so nógv, millum anna›, hvat hendir vi› øllum hesum, sum nú er fari› fram.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:

Sóljan: Marjun Jørgensen 8(5), Sólja Nielsen 3, Hertha Simonsen 3

Neistin: Birita Wardum 7, Súna Mørk 5(2), Annika Thomsen 4(2), Gunvør Hofgaard 3, Mildrid Jacobsen 2, Susan Brockie 2, Bjørg Patursson 1(1)

Brotskøst: Sóljan 5, Neistin 6

Útvísingar: Sóljan 1, Neistin 2

Dómarar úr VÍF: Erling Heinesen og Agnar Joensen